## DAGSINS MEINING

# Ógreið politisk viðurskifti

Gallupkanningin og sendingin Sostatt avdúka, at politiska myndin framvegis er rættiliga ógreið. Sjálvt um ein ikki eigur at taka slíkar kanningar fyri annað, enn tær eru, nevniliga kanningar, so er tó greitt, at samgongan hevur mist meirilutan. Veljarin hevur mist álitið á samgonguna. Hetta vildu løgmaður og varaløgmaður sjálvsagt ikki viðganga, men vístu teir til stóru innanhýsistrupulleikarnar í samgonguni hetta árið hon hevur havt valdið.

Løgmaður fekk eina dygga álitisváttan, tað skerst ikki burt, og kann hann tí staðfesta, at herferðin hjá Tjóðveldisflokkinum móti honum, sum byrjaði við, at hann varð sagdur at vera kriminellur, hevur so ikki ávirkað veljaran. Varaløgmaður segði seg vera væl nøgdan við úrslitið, tí sitandi samgongur fáa altíð frammaná í veljarakanningum. Tað kann hann hava rætt í. Hinvegin var hann týðuliga firtin inn á føroyska veljaran, sum ikki í nóg stóran mun virðismetir avrikini hjá samgonguni.

Tað er áhugavert, at allir samgonguumboðsmenninir ásannaðu, at klandur og óskil valdar í samgonguni, men eingin kundi rættiliga greiða frá, hví tað er soleiðis. Ymiskt kundi bent á, at persónliga samskifti millum eitt nú løgmann og varaløgmann er ikki hitt besta. Hetta kom m.a. fram við, at varaløgmaður opinberliga ikki er samdur við teimum mongu, sum halda Annfinn Kallsberg verða hin besta løgmann. Ikki minni áhugavert er tó, at øll samgonguumboðini tóktust avgjørd í, at halda saman til tann beiska enda. Við Galluptølunum í huga kann hetta ikki undra! Hetta bendir á, at formaður javnaðarflokksins hevur rætt, tá hann vildi vera við, at samonguflokkarnir hildu fast við valdið fyri valdsins skuld.

Tíðindini í seinastuni um eitt nú órímuliga rúsdrekkapolitikkin vísa, hvussu stórt vald teir stóru flokkarnir hava givið eitt nú Miðflokkinum og bendir hetta á, at hesin flokkurin – tí hann situr við lyklinum til samgonguna – kann tvinga hinar stóru flokkarnar at góðtaka hansara ekstremu og óvirrðiligu sjónarmið. Hetta er ein óverdug gongd.

Galluptølini hjá andstøðuni, serstakliga hjá Sambandsflokkinum, eru ein klár ábending um, at veljarin er troyttur av sitandi samgongu. Um hetta so samstundis stavar frá nøgdsemi veljarans við politikkin hjá andstøðuni er nokk ein eitt sindur opin spurningur. Tað, sum tó er rættiliga greitt, er, at skal andstøðan varðveita góðu undirtøkuna, er ikki nóg mikið við bert at finnast at, soleiðis sum serstakliga Sambandsflokkuirn hevur gjørt. Andstøðuflokkarnir mugu hvør sær sýna eitt púra klárt og trúverdugt politiskt alternativ til samgonguna, um henda positiva gongdin skal halda fram. Einstøk mál eru góð at leggja fram, men neyðugt er at leggja fyri almenningin ein ítøkiligan politikk, sum kann tryggja vælferð og trivnað borgarans, nú tað búskaparliga fer at ganga hinvegin, og ein vaksandi ótryggleiki breiðir seg í samfelagnum. Eftir sendingina Sostatt stendur veljarin við myndini av eini samgongu, sum bert situr fyri at varðveita valdið fyri at hava valdið. Men myndin fevnir eisini um eina andstøðu, ið alt meira vinnur veljarans álti, men sum tó má liggja nógva meira á takinum, um hetta álit skal kunna varðveitast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyri egnu rokning

**Hergeir Nielsen**



Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1999 varð upplýst av landsstýrismanninum í vinnumálum, at strekkið Øravík Hov trongdi til ábøtur, og at ætlanin var at kanna, um tað var ráðiligt at byggja ein tunnil í staðin fyri at breiðka vegin.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 2000 varð upplýst av landsstýrismanninum, at forkanningar vóru gjørdar, og at ætlanin nú var at halda fram við kanningum og møguliga at fara undir at projektera.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 2001 varð upplýst av landsstýrismanninum, at seismiskar kanningar vóru gjørdar á fyribils valdu linjuni, og at ætlanin nú var at gera fyrireikingar til sjálvt tunnilsarbeiðið, herundir vegir, innsløg og arbeiðsøki.

4 mió. kr. skuldu nýtast til hetta arbeiði í 2001 upplýsti landsstýrismaðurin, og løgtingið játtaði peningin.

Eingin vegur, einki innslag og einki arbeiðsøkið varð kortini gjørt. 1,5 mió. kr. av heimildini til tunnilsarbeiði var ístaðin nýtt til at gera nøkur møtipláss á leiðini, meðan restupphæddin fór aftur i ommu sína.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 2002 hevði landsstýrismaðurin ongar viðmerkingar um Øravíkar Hov leiðina og skeyt upp at brúka 0 mió. kr.

Løgtingið samtykti kortini at játta 1 mió. kr. til at byrja vegagerðina til bergholið, meðan landsstýrismaðurin afturímóti syrgdi fyri, at eingin vegagerð byrjaði kortini.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 2003 hevði landsstýrismaðurin heldur ongar viðmerkingar um Øravíkar Hov leiðina og skeyt enn eina ferð upp ikki at brúka meiri enn 0 mió. kr. til endamálið.

Løgtingið samtykti kortini at játta 7 mió. kr. til endamálið.

Yvir eitt longri áramál hava vit soleiðis játtað og fregnast eftir kanningum og loysnum á Øravíkar Hov bergholinum uttan at nakað veruligt er komið burturúr.

Um ársskiftið visti landsstýrismaðurin so at siga okkum, at Øravíkar Hov bergholið fekst fyri 130 mió.kr., og løgtingið játtaði 7 mió. kr. til ætlanina í hesum árinum.

Vit vóru fleiri, ið hildu, at hetta mál ikki hevði verið í nóg góðum hondum, og var tí ein fundur tikin við annan sakkunnleika, NCC, um hetta mál á kyndilsmessu í ár.

Har fingu vit beinanvegin eina skrivliga kostnaðarmeting av eini nýggjari dagførdari tunnilsføring.

Hesin tunnil var dagførdur, hvat samferðslu viðvíkti, og kostaði ein triðing minni enn tann fjallasmogan, sum landsstýrismaðurin var komin fram til eftir áralongu rannsóknir sínar.

Harafturat skuldi ikki ein króna brúkast til fjallavegin, sum landsstýrismaðurin ætlaði at brúka 42 mió. kr. til.

Munurin á uppskotinum frá NCC og tí frá landsstýrismanninum var sum nátt og dagur.

Ovurstórur í krónum og oyrum og uppaftur størri í reinum nyttuvirkningi.

Hóast 7 mio.kr. vóru játtaðar um ársskiftið til at rigga arbeiðsplássið til og at byrja arbeiðið at gera tunnilin, so hevur landsstýrismaðurin ikki nortið hetta Columbuseggið, sum varð vorpið á kyndilsmessu.

NCC sigur, at ikki er neyðugt við fleiri kanningum, um teir skuldu gjørt arbeiðið, meðan landsstýrismaðurin, sum hevur kannað málið í 4 ár heldur, at fleiri kanningar eru neyðugar.

Hóast bæði játtan og útgerð til neyvari kanningar av hesi farleið hevur staðið tøk í Suðuroy, so er púrt einki gjørt við málið, nú vit hava lagt 3 mánaðar aftur um okkum.

NCC hevur tíverri verið órógvað av óhepnum tíðindaflutningi, og hevur í einum tíðindaskrivi sagt, at talan var ikki um eina byggi- ella verkætlan, sum er kannað út í æsir, men um eina kostnaðarmeting, og at tíðindi hesum viðvíkjandi sostatt vóru fyri egna rokning.

Í tilmæli mínum á kyndilsmessu til landsstýrismannin og til vinnunevndina varð skrivið frá NCC hjálagt, so har var einki at fara skeivur av. Talan var púra greitt um eina kostnaðarmeting.

Upplýst er eisini, at NCC eisini hevur tosað um eina kostnaðarmeting á einum seinni fundi við vinnunevndina.

Míni tíðindi eru sostatt fyri egnu rokning mína og reiðiliga tað, meðan eg sjálvandi ikki fái heft fyri onnur avlagaði tíðindi, sum frammi hava verið.

Sjálvandi er munur á einari byggi- ella verkætlan og einari kostnaðarmeting. Tað hava vit so mong dømi um frá landsverkfrøðinginum millum ár og dag.

NCC stendur harafturat fast við, at kostnaðarmetingin var gjørd við føstum kostnaði, og sostatt ikki við einari fjaldari dagsskrá um, at byggiharrin skuldi heftað fyri møuligu vansum inni í fjallinum.

Treytir av hesum slag verða sjálvandi bygdar inn í ein sátmála, uttan mun til, hvør ið fær arbeiðið annars.

Samfelagsbúskaparliga hanga ætlanirnar væl saman, um vit fáa undirtøku fyri at sleppa ætlanini hjá landsstýrismanninum. Tá spara vit heilar 43 mió. kr. í fyrsta umfari, og vit nærkast greiðum reglum fyri, at tílík stór arbeiði gerast meira nøktandi fyri skattgjaldaran, tá tey verða boðin út.

Ætlanin var at játta 65 mió. kr. til samferðsluhavnina yvir 2 ár, og 35 mió. kr. til tunnilin yvir 2 ár, ella tilsamans 100 mió. kr.

Samferðsluhavnin kostar 50 mió. kr. við tunnilsgróti, og gjøgnumboring av tunlinum kostar eisini 50 mió. kr., ella 100 mió. kr. tilsamans.

Liðugtgerð av tunnli kunnu vit so taka í øðrum umfari.

Umráðandi er tí at tengja hesar ætlanir saman, og ábyrgdarleyst er bæði búskaparliga og verkliga ikki at gera tað.

Øravíkar Hov bergholið forðar ikki fyri, at farast kann undir tann partin av samferðsluhavnini, ið hevur mestan skund, so at skipið kann leggja at.

Um løgtingið sigur, at grótið til samferðsluhavnina í mest møguligan mun verður tikið úr Øravíkar Hov bergholinum, forðar einki fyri, at annað tilfar kann takast aðrastaðni.

Gróti hava vit nokk av.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyarleiðin og Leirvíksleiðin

**Finnleif Guttesen**



Ferðaætlanin sum kemur í gildi 1. mai vísir greitt, hvussu væl ella illa tingmenn arbeiða fyri síni valdømi

Suðuroyarleiðin hevur 14 túrar um vikuna, meðan Leirvíksleiðin hevur umleið 140 túrar um vikuna og tvey skip sum ger, at títtleikin er sum hann er.

Ferðaætlanin til Suðuroy hevur haft 3 gerandisdagar, sum hava verið til gagns fyri suðuroyingar, men er hetta nú minkað við 33,3 prosentum ella til 2 gerandisdagar um vikuna við nýggju ferðaætlanini.

Orsøkin til hesa beistagerð skal verða, at hetta hevur eina sparing við sær uppá 4-500.000 krónur. Men eftir mínari meting er hetta bert gjørt tí Norðoyatingmenn við løgmanni á odda hava kravt, at Dúgvan skal sigla og kostar hetta SL 1,8 mió krónur eyka.

Við at skerja møguleikarnar hjá suðuroyingum við hesari broyting, kemur SL bert at mangla 1,3 mió krónur til at hava Dúgvuna siglandi.

Frágreiðingin, sum landsstýrismaðurin kom við á tingfundinum 30. apríl 2003 um at Smyril skal umvælast og at nógvur farmur var hósdag er einki annað enn uttanumtos.

***Ein kann ikki siga annað enn, at suðuroyingar eru óluksáliga tolnir tí teir finna seg í øllum*.**

# Tjóðveldisflokkurin vil flyta lærlinga-útbúgving úr Havnini

### Samgongan og Jógvan Arge í trongum skóm

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Í besta einaræðisstíli varð fundur hildin í mentunarnevndini hjá løgtinginum hósmorgunin 24. apríl 2003, kl. 8:15.

Tvey mál vóru á skránni:
1. Uppskot til løgtingslóg um at byggja miðnámsskúla í Vági
2. Uppskot til løgtingslóg um veiting til yrkisútbúgvingarskúla í Havn

Sum fastur táttur hevur verið til allar fundir í mentunarnevndini ta seinastu tíðin, so stóð Tekniski Skúlin í Havn aftur henda morgunin niðast á skránni.

Hesa framferð kundi eg ikki góðtaka og fekk ført í gerðabókina, at eg mótmælti, at eitt yngri mál varð sett á skrá frammum eitt eldri.

Høgni Hoydal við fylgi kom á fundin og greiddu frá báðum málunum.

Tað tók ein tíma at avgreiða skúlan í Vági, sum kostar 55 mió. krónur. Álit er skrivað og latið løgtinginum.

Verri er við álitinum viðvíkjandi Tekniska Skúla í Havn. Nú álit skuldi skrivast, hendi tað enn einaferð, at samgongan var ikki sinnað at avgreiða málið. Formaðurin hevur síðani upplýst fyri Útvarpinum, at málið er enn til viðgerðar í nevndini, og er ikki klárt at avgreiða.

Formaðurin hevur nú havt málið í mentunarnevndini síðan 6. mars. Nú skriva vit 29. apríl, og málið er framvegis ikki avgreitt. Tingið fer heim 2. mai, og tá fellur málið burtur, um tað ikki er endaliga avgreitt.

Hesa framferð hjá samgonguni um Tekniska Skúla í Havn, vil eg átala harðliga. Álit er skrivað, og málið er klárt at leggja fyri tingið til 2. viðgerð, um vilji er til tað.

Hesin arbeiðsháttur, sum sitandi samgonga við Tjóðveldisflokkinum á odda stendur fyri, er ein grov vanvirðing av Føroya Løgtingi og teimum, sum varða av skúlunum.

Tjóðveldisflokkurin hevur ongan skúlapolitik, og uttan nakað mál og mið er rossahandil um skúlar nú gjørdur í samgonguni í besta 80-ára stíli.

Jógvan Arge vísti í grein í Dimmalætting týsdagin á, at tað kann fáa ivasamar fylgjur fyri borgararnar, tá býráðspolitikkur í Havn verður drigin upp í løgtingspolitik. Men hetta málið er júst eitt dømi um, hvørjar fylgjur tað fær fyri borgararnar, tá ein politikari sigur eitt í býráðnum og annað í løgtinginum.

Tað kundi verið áhugavert at fingið eina frágreiðing um, hví Jógvan Arge er so grammur eftir at flyta lærlingaútbúgvingar út úr Havnini? Kanska hann sum býráðslimur og løgtingslimur fyri Suðurstreym kann greiða skúlaverkinum og øllum teimum lærlingum, sum ganga í Tekniska Skúla í dag, frá síni genialu ætlan? Hetta er ein loysn, sum Tjóðveldisflokkurin er komin við, vísandi til 3. petti í uppskotinum um skúlabyggingarætlan dagfest 16. apríl 2003, sum er undirskrivað av Høgna Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin, sum hevur 3 tingmenn í Suðurstreym, er heitasti talsmaður fyri at flyta læringaútbúgvingarnar út úr hesum valdøminum. Vónandi hugsar veljarin seg væl um til næsta val. Hetta er flokkurin, sum vil avtofta yrkisskúlarnar í Havn.

# Kórstevnan 2003 á Eysturskúlanum í Havn 15.- 17. mai.

TÍÐINDASKRIV

Árliga kórstevnuhaldið, sum í ár hevur 36 ár á baki, hevur verið heldur óregluligt í seinastum. Ein megintrupulleiki hevur verið at semjast um rætta vikuskiftið til hetta felags kórtiltak; men í samráð við kórini í Havn varð sum fyrr fráboðað avgjørt at hava stevnuna í ár í dýrabiðidags vikuskiftinum t.e. um tvær vikur.

Musikalskur stevnuleiðari verður tónlistamaðurin Mogens Dahl, sum telist millum teir mætu í Danmark í dag, og sum føroyskir kórleiðarar og kórsangarar í Havn kenna væl frá regluligum skeiðvirksemi yvir tvey ár herfyri.

Á skránni hevur Mogens úrvaldar norðurlendskar og europeiskar kórperlur.

Umframt sangarar í limakórunum eru "kórleysir" sangarar eisini vælkomnir at verða við.

Stevnuskráin verður tann, at sangarar møta á Eysturskúlanum til ein nátturðabita hóskvøldið 15. mai kl. 18.00, stevnan verður sett kl. 19.30, og síðan verður felagsvenjing fram til kl. 22.00

Fríggjadagin verður felagsvenjing fyrrapart og seinnapart, og um kvøldið hava einstøku kórini høvi at frambera egna skrá á fyrru kórstevnukonsertini, sum byrjar kl. 20.00.

Leygarmorgunin møtast sangarar aftur til felags kórsang, seinnapartin verður aðalroynd, og kl. 17.00 verður so seinna kórstevnukonsertin, har høvi verður at hoyra tað, sum felagskórið hevur fingið á skaftið, og ivaleyst eisini onkur av einstøku kórunum, alt eftir hvussu long felagsskráin verður, og hvussu mong kór, ið ynskja egna framførslu.

Kostnaðurin fyri luttøku, allar máltíðir og veitslu eftir konsertina leygardagin er 500 kr. Tey, sum ikki taka lut í sjálvari stevnuni, men eru við í einstøkum kóri og ynskja at verða við á veitsluni, rinda 250 kr.

Peningurin er at flyta inn á konto nr. 9181-138 970 1 (Føroya Sarikassi).

Tilmeldingingarfreistin er næsta fríggjadag 9. mai, og boðað verður frá til
Doru Samuelsen, tlf. 31 48 50,
Ellu Reinert, tlf. 31 37 22 el. 257905 ella
Herluf Lützen, tlf. 31 15 14 el. 22 76 80

# ALV byrjar enn eitt nýtt virksemi, sum kallast "Avlamisarbeiði"

TÍÐINDASKRIV

Hesaferð er talan um at geva arbeiðstarnaðum møguleika at møta øðrum, fyri at fá ein meira innihaldsríkan og stimbrandi gerandisdag.

"Avlamisarbeiði" er ætlað avlamisfólkum í vinnuførum aldri, ið hava fingið tillutað hálva ella fulla pensión.

Tað, vit hava at bjóða, er eitt nú ítriv og samveru, so sum handaligt arbeiði, spøl og líknandi.

Í fyrstu atløgu er talan um at hava virksemið 2 ferðir um vikuna, millum kl. 17.00 og 21.00. Vit vænta at byrja í mai 2003.

Virksemið verður í okkara nýggju snotuligu hølum í Smiðjugerði 6 kj., Tórshavn. (við síðuna av Bilfríðkan)

Áhugað, ið ynskja at søkja upptøku, kunnu venda sær til skrivstovuna á tlf. 35 00 70, fyri at hoyra nærri og fáa umsóknarblað.

# Skeið í sjálvsmenning

TÍÐINDASKRIV

Ert tú konufólk og hevur áhuga í at menna teg persónliga, er hetta skeiðið kanska júst nakað fyri teg. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 31.mai og 1. juni í ár

Ein ferð byrjar altíð við fyrsta fótafetinum, sigur skeiðleiðarin, sum seinastu fimm árini hevur hildið serstakt skeið fyri kvinnur. Ein orsøk til at hetta er kvinnuskeið burturav, kemst av, at kvinnur kenna seg tryggari og kunnu betur tosa um síni viðurskifti sínamillum, tá ið tær eru í bólki fyri seg.

Soleiðis sigur Anette Sundby, skeiðleiðari. Hon er útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 14 árini skipað fyri skeiðum, har hon m.a. lærir kvinnur, hvussu tær kunnu mennast og soleiðis økja sjálvsvirðið.

Nógvar kvinnur koma á hesi skeið, tí at tær hava hug at læra okkurt nýtt, ella tí tær standa á einum vegamóti í lívinum, har teimum tørvar at læra meiri um sínar persónligu eginleikar, sigur Anette Sundby.

Orsøkin til at hon hevur ment hesi serligu kvinnuskeið, er, at hon hevur sjálv verið fyri stórum mótburði. Tað hevur gjørt, at hon ofta hevur ivast í sínum egna kvinnuvirði. Fyri at vinna á ivanum hevur hon stríðst fyri at endurskapa kensluna av síni styrki sum kvinna. Hesum royndum vil Anette Sundby m.a. greiða sínum medsystrum frá.

Skeiðið er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum. Ert tú áhugað í at læra nakað nýtt, sum kann menna teg í arbeiðs- og persónliga lívinum, er hetta skeiðið kanska ein møguleiki.

Skeiðið er ikki nakar "undurkurur", men heldur ein byrjan á einari ferð, har tú fært hugskot og íblástur, sum tú kanska droymir um, til m.a. at skapa broytingar í lívsgrundarlagnum, men ikki veitst, hvussu skal fremjast.

Á skeiðinum verður høvi at gera sær tankar um lívið, at hugsa seg gjølla um og at arbeiða fram ímóti at seta sær onnur stevnumið.

Skeiðið verður í Slættanesgøtu 5, leygardagin 31.mai og sunnudagin 1.juni báðar dagar kl. 9 – 17.

Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 18 luttakarar. Kostnaðurin er 1850 krónur, íroknað er skeiðtilfar, kaffi/te, køkur og frukt eisini fáa luttakarnir ein serliga "gávu".

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at venda sær til Sigrún Mohr, telf. 315298, ella til Anette Sundby, tlf. 0045 45424650, telduadr: email@anettesundby.dk
Eisini ber til at fara inn á heimasíðuna www.anettesundby.d